NVD *Rit*

SERRITGERÐ
Thesis

TØKNIFRÁGREIÐING
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

# Ymiskt um føroysku haruna

## og haruskjóting í Føroyum

Eyðfinn Magnussen



NVD*Rit* 2017:01

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

| | |
|---|---|
| Heiti / Title | **Ymiskt um føroysku haruna og haruskjóting í Føroyum** |
| | *The Faroes hare and hare hunting in the Faroe islands* |
| Høvundur / Author | **Eyðfinn Magnussen** |
| | 2. útgáva 14. juli 2017 |
| Ritslag / Report Type | Tøknifrágreiðing/Technical Report |
| *NVD*Rit | 2017:01 |
| © | Náttúruvísindadeildin og høvundurin |
| Permumynd / Cover Picture | Sofus Poulsen |
| Útgevari / Publisher | Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya |
| Bústaður / Address | Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands) |
| Postrúm / P.O. box | 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands) |
| ☎ • 🖷 • @ | +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo |

## Innihaldsyvirlit

Fororð ........................................................................................................... Síða 4

1. Føroyska haran. .............................................................................................. 5

2. Haruveiðan í Føroyum og hvussu hon er skipað ........................................................ 7

3. Haruveiðan í Føroyum – Hvussu nógv verður skotið og týdningurin av hesum .............. 9

4. Søla og prísir á haruhøgum ........................................................................... 11

5. Hvussu leingi livir ein hara? ........................................................................... 13

6. Verður ov nógv skotið? .................................................................................. 15

7. Haruskjóting – Ein mannfólkaítrótt burturav ...................................................... 17

## Fororð

Sjey fylgjandi mánamorgnar í november og desember mánað í 2016 var eitt fast innslag um haru og haruskjóting í Føroyum í “Góðan Morgun Føroyar”- sendingunum hjá Kringvarpinum.

Fyrst var ein tekstur um føroysku haruna ella haruskjóting í Føroyum lisin. Aftaná ringdi morgunverturin til Eyðfinn Magnussen, sum er lektari í lívfrøði á Fróðskaparsetrinum, fyri at frætta tað nýggjasta um haruveiðuna, og hvussu hon hevði hilnast.

Tað eru teir sjey tekstirnir, sum vórðu lisnir upp í hesum sendingunum, sum standa í hesum heftinum.

Tann fyrsti teksturin varð lisin 7. november, tann seinasti 19. desember.

## 1. Føroyska haran.

Haran, sum í dag er í Føroyum, verður nevnd snjóhara (*Lepus timidus*). Hon varð innflutt til Føroya í 1855 og 1858 frá norska økinum "Kragerø", sum er uttarlaga í Oslofjørðinum – 4 harur hvørja ferð. Harurnar vórðu settar út í Hornabø í Havn og runnu niðan á Kirkjubøreyn. Tær vuksu skjótt í tali og vórðu síðan fluttar til hinar oyggjarnar. Í dag finst haran í øllum oyggjunum í Føroyum uttan í Koltri, Stóru Dímun og Lítlu Dímun.

Men ein hara er ikki bara ein hara. Tað finnast eini 30 ymisk sløg av harum runt um í heiminum. Snjóharan er eitt av hesum sløgunum. Áðrenn snjóharan varð innførd til Føroyar, høvdu royndir tó verið gjørdar við at seta út danskar harur. Hesar trivust tó ikki og doyðu tí útaftur. Donsku harurnar eru av slagnum *Lepus europaeus,* og verður vanliga nevnd evropeiska haran, ella brúnharan. Hon livir í heitari londum og er spjadd um tað mesta av evropa, har Danmark er millum tey norðastu londini.

Føroyska haran nevnist sum sagt snjóharan. Umframt í Føroyum, finst hon í Skotlandi, Írlandi, Skandinavia, Finnlandi, Norðurrusslandi og Sibiria. Eisini finst ein minni harustovnur í Alpunum og á japansku oynni Hokkaido.

Haran er 46-61 cm long og vigar í miðal 2,7 kg. Frambeinini eru stutt og kløn, meðan afturbeinini eru long og kraftig. Oyrasnippurin er svartur. Haran hevur stór útstandandi eygu og sær sera væl, bæði í myrkri og í dagslýsi. Oyruni eru stór og uppstandandi og haran hoyrir sera væl. Oyruni kunnu, hvør í sínum lagi, snarast í ymiskar rætningar, so haran altíð hoyrir hvat fyriferst rundan um hana. Hoyrir hon okkurt, vendir hon sær móti ljóðinum við útspílaðum oyrum og metir um vandan.

Tær fyrstu harurnar, sum komu til Føroyar, vóru snjóhvítar um veturin, men longu í 1860-árunum vórðu nakrar vetrarharur sæddar, sum vóru blágráar á liti. Hesar verða eisini nevndar bláharur. Hesar vuksu skjótt í tali og trokaðu skjótt ta hvítu snjóharuna burtur. Veturin 1916-1917 varð tann seinasta snjóharan skotin.
Litbroytingin, sum hendi við føroysku harunum, liggur í genunum: Royndir við snjóharu og bláharu vísa, at genið fyri tann hvíta vetrarfeldin altíð er ráðandi. Hevur tí bara ein av teimum átta uppsleptu snjóharunum havt tað víkjandi bláharuættarbregði í sær, hevur hetta genið við tíðini nørt seg í tí grýtuta føroyska umhvørvinum og trokað snjóharugenið burtur. Tí gingu bert 60 ár, so var tað hvíta snjóharuættarbregðið burtur.

Haran er gnagdjór. Sagt verður, at føroyska haran etur plantur, grøs, stør, urtir og trøllakampar. Men í veruleikanum vita vit tað ikki, tí ongar vísindaligar kanningar eru gjørdar av hesum. Eisini etur hon knubbar og endaknuppar á runnum og trøum. Hetta munnu nógv teirra, sum hava rundan um húsini hava sannað, tí um veturin koma harurnar ofta oman móti húsum at leita sær føði og gnaga burtur av trøunum.

Haran er virknast í skýmingini. Í makingartíðini sæst ein serlig atferð hjá haruni. Tær renna hvør eftir aðrari og gera seg upp, og tá síggja vit tær eisini um dagin. Haran hevur ikki ein fastan maka, men kann para seg við fleiri ymiskum frensum gjøgnum árið. Hon gongur kviðin í einar 7 vikur. Haran leggur tríggjar ferðir um árið: Fyrsta løgan er í februar-mars, onnur í mai-juni og triðja løgan er í august-september.

Tveir til tríggir ungar eru í hvørjari løgu. Kortini er sjáldan, at veðrið er so gott, at allar tríggjar løgurnar koma undan. Tá haruskjótingin er í november - desember mánað, ber ofta til at skilja í millum hesar tríggjar løgurnar við at viga harurnar. Tær yngstu harurnar, tær frá heystløguni, vigar í miðal 2 kg, tær frá summarløguni viga 2,5 kg, meðan várløgan og tær, ið eru meira enn ársgamlar, viga í miðal eini 3 kg, men tær tyngstu kunnu tó koma heilt upp ímóti fimm kilo.

Hetta var eitt sindur um føroysku haruna. Næsta mánamorgun skulu vit hoyra eitt sindur um haruveiðuna í Føroyum, hvussu hon er skipað, og hvussu tíðin, har loyvt hevur verið at skjóta haru, er broytt gjøgnum árini.




*Útsjóndin á Føroyskum harum 19. mai (ovara) og 7. desember (niðara myndin)*



*Norsk hara í vetrarbúna*

## 2. Haruveiðan í Føroyum og hvussu hon er skipað

Seinasta mánamorgun hoyrdu vit eitt sindur um føroysku haruna, sum upprunaliga varð innflutt til Føroya frá einum norskum øki í Oslofjørðinum, ið nevnist Kragerø. Hetta var í 1855. Harurnar vuksu skjótt í tali og vórðu síðan fluttar til hinar oyggjarnar. Nøkur ár eftir at haran var innflutt, fóru menn at skjóta harur, og hevur hetta síðani verði fastur siður í Føroyum í meir enn hálvtannaðhundrað ár.

Haruveiðan í Føroyum er skipað sambært løgtingslóg nr. 128 frá 25. oktober 1988 um haruveiðu. Lógin er sera stutt; einans tvær greinar, umframt sektarmøguleikar og gildiskomu. Í grein eitt verður ásett, at loyvt er at skjóta haru í tíðini 2. november til 31. desember, báðar dagar íroknaðar. Stykki tvey og trý í hesi greinini umrøða møguleikan at friða. Í grein 2 verður sagt, at haruveiðan má bert fara fram í dagsljósi gerandisdagar, og loyvt er bert at nýta høglbyrsu. Annars eru ongar bindingar í lógini, og tað er sostatt frítt hjá harumonnum at skjóta í tí hagaparti, har teir antin hava fingið ella keypt sær rættindi.

Vanligt er, at haruhagar verða seldir, nakað áðrenn harutíðin byrjar. Sum oftast fyri eitt ár í senn, men tað kemur eisini fyri, at hagarnir verða seldir fyri fleiri ár. Eisini er vanligt, at fjallmenn sleppa at skjóta hjá bóndanum, har teir ganga á fjalli.

**Veiðutíðin**
Í dag er sum sagt loyvt at skjóta haru í Føroyum í tíðarskeiðinum 2. november til 31. desember, einar 60 dagar um árið, men soleiðis hevur ikki altíð verið. Fyrsta lógarásetingin um haruskjóting í Føroyum er frá 1881. Tá var loyvt at skjóta harur í tilsamans 136 dagar um árið: Byrjað varð longu 1. oktober, og skotið var fram til 14. februar. Hetta munnu teir hava hildið verið ov nógv, og í 1928 varð veiðitíðin tí stytt til 92 dagar, frá 1. november til 31 januar.

Í 1945 varð lógin aftur broytt, so skjótast kundi 60 dagar um árið, frá 1. november til 31. desember, og er hetta stórt sæð tað, sum hevur verið galdandi síðani. At veiðitíðin í 1945 varð stytt, hevur uttan iva verið fyri at verja harustovnin. Ein eldri harumaður, sum eg havi tosað við, segði mær, at hann, í sínum ungu døgum, hevði skotið harur saman við eldri monnum, sum eisini høvdu skotið í teirri tíðini, tá tað var loyvt at skjóta haru heilt fram til 31. januar. Hesir menn høvdu sagt honum, at fleiri av harunum, sum tá vórðu skotnar í januar mánað, høvdu ungar í búkinum, og at hetta skuldi vera grundin til, at veiðitíðin varð stytt til tað, sum vit kenna í dag, t.v.s. til 31. desember. Hetta er væl hugsandi, tí haran leggur sína fyrstu løgu longu í februar- mars mánað. Haran gongur kviðin í einar 7 vikur, og tí áttu allar tær kviðnu harurnar at havt fostur í sær í januar mánað. Tað er tí uttan iva rætt, sum teir gomlu harumenninir hava sagt.

Sum longu sagt, so hevur tað síðani 1945 verið loyvt at skjóta haru einar 60 dagar um árið, men tað hava tó verið tíðarskeið við smærri broytingum. Í 1969 kundu teir einans skjóta 30 dagar um árið, frá 3. november til 3. desember, men hetta stutta tíðarskeiðið var longu longt aftur árið eftir, tá skjótast kundi fram til 20. desember. Í 1972 varð tíðarskeiðið aftur longt, so tað var frá 3. november til 31. desember, men í eini lógarbroyting, sum var gjørd í 1988, var veiðitíðin longd við einum degi, so veiðitíðin, í staðin fyri at byrja 3. november, nú skuldi byrja 2. november. Hví hetta varð gjørd, er óvist. Lógin er undirskrivað av Jógvani Durhuus, sum tá var landsstýrismaður. Sjálvur heldur Jógvan, at talan helst man hava verið um ein skrivifeil í lógartekstinum.

Hetta var eitt sindur um hvussu haruveiðan er skipað í Føroyum og hvussu veiðitíðin er broytt gjøgnum árini. Næsta mánamorgun skulu vit hoyra eitt sindur um hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum og hvønn samfelagsligan týdning hetta hevur.




*Tíðarskeiðið, har loyvt hevur verið at skjóta harur í Føroyum árini 1881 til í dag.*

## 3. Haruveiðan í Føroyum – Hvussu nógv verður skotið og týdningurin av hesum

Seinast hoyrdu vit eitt sindur um haruveiðuna í Føroyum, hvussu hon er skipað og hvussu veiðitíðin er broytt gjøgnum árini. Í morgun skulu vit hoyra eitt sindur um, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum og hvønn týdning hetta hevur.

Hara hevur verið skotin í Føroyum í eini hálvtannaðhundrað ár, men hvussu nógvar harur hava verið skotnar øll hesi árini, vita vit í veruleikanum lítið og einki um. Tá tað kemur til veiðu á sjónum; fisk og hval, so vita vit rímiliga væl, hvussu nógv er komið upp á land á hvørjum ári. Men tá tað kemur til veiðu uppi á landi, fugl og haru, so vita vit sera lítið, fyri so at siga slett einki, tí eingin føroyskur myndugleiki hevur tikið sær av hesi uppgávuni.

Teir, ið skjóta haru í Føroyum, hava ikki skyldu at boða frá, hvussu nógvar harur teir hava fingið, hvussu ofta teir hava skotið ella hvussu nógvir mans hava verið við. Tí vita vit heldur ikki, hvussu nógv hara hevur verið skotin í Føroyum gjøgnum tíðina, ella hvussu stór royndin hevur verið.

Fyri at bøta um hetta fór eg í 2012 undir at skráseta, hvussu nógvar harur veruliga verða skotnar í Føroyum. Innsavningin av veiðutølum varð gjørd við støði í Facebook-bólkinum "*Haruskjóting í Føroyum*", har harumenn sjálvbodnir boða frá, hvussu nógv teir hava skotið.

Úrslitið gjørdist rættuliga óvæntað, tí hetta fyrsta árið blivu ikki færri enn 5.381 harur skrásettar at vera skotnar í Føroyum. Men samlaða talið hevur helst verið omanfyri 7.000, tí tað var sjálvboðið at boða frá, og tí eru tað uttan iva fleiri harutøl, sum ikki vórðu fráboðað.

Kanningin hevur síðani verið gjørd á hvørjum ári, og veiðutølini hava verið vaksandi, men í 2015 minkaði veiðan. Í 2013 vórðu 7.756 harur skrásettar at vera skotnar í Føroyum. Í 2014 kom talið heilt upp á 9.318 harur, sum vórðu skotnar á 1.123 harutúrum í 348 hagapørtum kring landið, men í 2015 minkaði talið aftur, og 4.012 harur vórðu skrásettar at verða skotnar í 2015.

At áhugin fyri haruskjóting er stórur í Føroyum, sæst eisini aftur á talinum av monnum, sum skjóta. Í 2014 varð mett, at einir 1.200 veiðumenn skutu harur í Føroyum. Í 2015 var minni at fáa, og áhugin at skjóta var tí eisini minni. Í 2015 varð mett, at einir 800 mans skutu harur í Føroyum.

Tá vit nú hava fingið nøkur tøl um haruveiðuna, ber eisini til at gera sær nøkur roknistykki. Lat okkum taka støði í veiðuni í 2014. Hetta árið vórðu einar 9.400 harur skotnar. Um vit siga, at eini 800 gr av kjøti eru á hvørjar haru, so gevur hetta tilsamans 7.520 kg av harukjøti. Um eitt fólk etur 200 gr av kjøti til ein døgurða, so er talan um 37.600 máltíðir, ella umleið ein døgurð til hvønn føroying um árið. Siga vit, at prísurin á harukjøti er 125 kr/kg, so er samlaða virðið á harukjøtinum 940.000 kr, ella ein sløk millión krónur.

Men tað eru eisini útreiðslur knýttar at haruskjótingini. Umframt at keypa hagan, skal harumaðurin eisini keypa patrónir. Onkrir harumenn hava í fleiri ár skrivað niður, hvussu nógvar patrónir teir hava brúkt . Í miðal er hetta 2,5 patrónir fyri hvørja skotna haru. Um hetta er rætt, so verða 23.300 patrónir brúktar á hvørjum ári til haruskjóting. Siga vit, at hvør patrónin kostar 6 kr, so er samlaði prísurin á patrónunum 141.000 kr.

Soleiðis kann man spæla sær við tølunum, men tað krevst, at tølini eru til taks, og tað eru tey nú takkað verið hjálpini frá teimum umleið 1.200 føroyskum harumonnunum, sum allan november og desember mánað ganga í teimum føroysku fjøllunum fyri at skaffa mat til restina av familjuni og hava verið so beinasamir, at lata meg fáa hesi tølini.

Hetta var eitt sindur um hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum, og hvønn týdning hetta hevur. Næsta mánamorgun skulu vit hoyra eitt sindur um sølu og prísir á haruhøgunum.




*Tal av harum sum eru skrásettar at vera skotnar í Føroyum árini 2012 til 2016.*



## 4. Søla og prísir á haruhøgum

Rættindini til haruskjóting í Føroyum liggur hjá teimum, ið eiga hagan. Er tað landsjørð, so hevur bóndin hendan rættin. Er talan um ognarhaga, so eru tað eigararnir av haganum, sum eisini hava rættindini til haruskjótingina.

Vanligt er, at rættindini at skjóta harur verða seld, nakað áðrenn harutíðin byrjar. Ognarhagar verða sum oftast seldir á uppboðssølu, har tann sum bjóðar hægsta prísin fær hagan. Hjá bóndunum er tað ofta øðrvísi. Tá verða rættindini ofta avtalað millum bóndan, og tann, ella teir, sum ætla at skjóta í haganum. Vanligast er, at sølan ella avtalan er fyri eitt ár í senn, men hetta kann eisini gerast fyri fleiri ár. Eisini er vanligt, at fjallmenn sleppa at skjóta hjá bóndanum, har teir ganga á fjalli. Tey seinru árini er tað tó blivið meira vanligt at selja rættindini fyri ein dag í senn og til fleiri ymiskar menn. Prísurin hevur vanliga ligið um 200 til 300 kr fyri byrsuna fyri hvønn dagin.

Prísirnir á haruhøgum kring landi eru rættuliga ymiskir. Summastaðni eru prísirnir, sum haruhagarnir hava verið seldir fyri, skrivaðir niður, so til ber at síggja, hvussu prísurin er broyttur gjøgnum tíðina. Ein av hesum hagapørtunum er “Sundshagi” í Sandavági. Í einum 75-ára tíðarskeiði, frá 1939 til 2013, er hesin haruhagin seldur fyri millum 42 kr. og 10.500 kr. Tey fyrstu árini, fram til 1962, lág prísurin um 150-200 kr, so hækkaði prísurin, og árini 1963 til 1975 varð hagin vanliga seldur fyri einar 500 kr. Eftir hetta fór prísurin upp á einar 1.000 kr. Frá 1980-2004 var prísurin uml. 4.000 kr., men hækkaði so upp til einar 7.000- 8000 kr.

Vestmanna man vera tann bygdin í Føroyum, har mest verður gingið upp í haruskjóting. Í 2014 skutu vestmenningar tilsamans 1.220 harur, sum svarar til 13% av øllum harunum, sum vóru skotnar í Føroyum tað árið.

Í Vestmanna verða haruhagarnir seldir á uppboðssølu, sum verður hildin á Rógvugarði seinasta sunnudag í oktober mánað. Soleiðis hevur tað verið síðani 1942, tá Arni á Rógvu og aðrir tóku stig til uppboðssøluna. Øll hesi árini hevur uppboðssølan verið fyriskipað av Rógvu-familjuni. Í nógv ár var tað Arni á Rógvu, sum hevði uppboðssøluna. Seinni tók sonurin, Regin á Rógvu yvir og síðani 2006 hevur dóttir Regin, Eydna á Rógvu Simonsen, selt haruhagarnar.

Øll hesi 70 árini, sum Rógvu-familjan hevur selt haruhagarnar, eru prísirnir og hvør hevur keypt hagan, skrivað í eina svarta lummabók, sum tey hava í varðveitslu. Tíanverri er bókin fyri árini 1942 til 1965 blivin burtur, men bókin fyri árini frá 1966 og frameftir verður framvegis nýtt. Eydna á Rógvu Simonsen hevur verið so beinasom at læna mær hesa bókina.

Prísirnir á haruhøgunum í Vestmanna kunnu broytast nógv frá einum ári til annað. Góðar tíðir hava við sær, at kappingin millum hagarnar verður størri. Onkuntíð koma eisini avbygdarfólk til Vestmanna at bjóða, og so økist kappingin. Í 1993 vórðu hagarnir í Vestmanna seldir fyri tilsamans 29.600 kr, men í 2005 fóru teir fyri tilsamans 145.000 kr, men fóru so niður aftur í 65.600 kr í 2008. Teir mest sermerktu prísirnir vóru í 2005, tá harumenn, við einum bankastjóra úr Havn á odda, keyptu tveir haruhagar í Vestmanna fyri tilsamans 58.000 kr: Fjallið fyri 32.000 kr, og Útihagan á Bjørgum fyri 26.000 kr.

Í Fuglafirði hevur Kristin Poulsen skrivað prísirnar niður, sum haruhagarnar har í bygdini eru seldir fyri øll árini frá 1972 til 1995. Samanborið við nógva aðrastaðni í Føroyum, eru prísirnir á haruhøgum lágir í Fuglafirði. Miðalprísurin fyri hvønn haga øll hesi árini hevur ligið um 1.200 kr.

Dýrastur er Skarðhagi, sum í miðal hesi árini hevur verið seldur fyri 2.400 kr. Næstdýrastur er Gjógvaráhagi og triðdýrastur er Fjalshagi, sum í miðal hevur verið seldur fyri 1.800 kr hesi 24 árini, sum Kristin Poulsen hevur skriva prísirnar niður.

Kristin Poulsen hevur verið so beinasamur at geva mær hesi tølini. Tá eg hevði fingið tølini frá Kristini, og sat við telduna og skrivaði tey inn í eitt rokniark, vísti tað seg, at prísurin fyri “Gjógvaráhaga” tað eina árið var nógvar ferðir hægri enn vanligt. Vanliga varð hesin hagin seldur fyri einar 2-3.000 kr, men brádliga tað eina árið var prísurin heilar 9.200 kr. Eg helt fyrst, at hetta mundi vera ein skrivifeilur, og ringdi tí til Kristin at spyrja. Men nei, hetta var ikki ein skrivifeilur, segði Kristin, hatta var prísurin, sum “Gjógvaráhagi” varð seldur fyri tað árið. Tá eg so spurdi hann, hví so var, svaraði Kristin, “*at tað árið vórðu hagarnir seldir eitt leygarkvøld”*.

Hetta segði jú alt. Ikki er altíð neyðugt við einara langari frágreiðing fyri at vita, hvussu tingini hanga saman.



*Síðani 1942 hava haruhagarnir í Vestmanna verið seldir á uppboðssølu tann seinasta sunnudagin í novembermánað á Rógvugarði. Her er tað Eydna á Rógvu Simonsen, sum stendur fyri uppboðsøluni og selir haruhagarnar út gjøgnum vindeyga, meðan harumennirnir spentir fylgja við; flestu teirra við hendrunum djúpt niðri í lummunum.*



26/10 1969
Heimi Hagin 500
Jóannes Fonsdal
Reyni 150.
Goldið John Haldansen
Fjalli 550
Levis Olsen
Símbrúnar.
Brekkan 380
Andrea. Olsen
Nesi 300
Andrea Olsen
Úti hagin 400
Jógvan Isak

25/10 70 Reyni 750
goldið John Haldansen
Fjalli 1025
goldið Kristoffer Fonsdal
Grimbanar
Nesi 925
Brekkan 1950.
Andrea Olsen
Útihagin 650.
Johannes Haldansen
Heimi hagin 1225.
Tummas Olsen

*Prísirnir á haruhøgunum í Vestmanna, og hvør ið keypt hevur, verður skrivað í hesa bókina.*

## 5. Hvussu leingi livir ein hara?

Seinast hoyrdu vit eitt sindur um sølu av haruhøgum í Føroyum og hvat hesir verða seldir fyri. Ein spurningur sum eg, sum haruáhugaður ofta fái, er: “Hvussu leingi livir ein hara?”
Hendan spurningin skulu vit umrøða í morgun.

Lat meg byrja við spurninginum, “Hvussu áseta vit livitíðina hjá eini haru?” Ein máti, sum ofta verður nýttur, er “Miðallivitíð” ella “Hægsti aldur”, men hesi tølini siga í veruleikanum sera lítið um, hvussu langa livitíð ein haruungi kann vænta sær, tá hann kemur í verðina, tí deyðiligheitin er oftast størst fyrsta part av lívinum, men minkar so munandi, tá haran er fullvaksin. Tí er tað minni enn helvtin av teimum nýløgdu haruungunum, sum liva til “Miðalaldurin”, og bara evarska fáir, sum nærkast “Hægsta aldrinum”. Hetta er ikki bara galdandi fyri harur, men er vanligt fyri smá dýr, serliga hjá teimum, ið fáa nógvar ungar.

Tá lívfrøðingar skulu staðfesta, hvussu leingi dýr liva, verður hetta oftast gjørt við at fylgja lívsgongdini hjá einum heilum árgangi av dýrum. Eitt merki verður sett á dýrini, stutt eftir at tey eru komin í verðina, og so verður fylgt við, hvussu leingi hvørt einstakt dýr livir, og hvussu talið av dýrum í árganginum so líðandi minkar, líka til tað seinast dýrið er deytt. Við støði í hesum úrslitunum, ber so til at gera útrokningar um livitíðina, og hvussu livilíkindini broytast við tíðini, bæði gjøgnum árið og frá einum ári til annað.

Um okkara leiðir er haran best kannað í Skotlandi. Har vísa kanningar av haruungum, at longu eftir einum ári, var meginparturin av ungunum deyður. Hetta sást eisini aftur, tá skotið varð, tí einans 23 % av teimum skotnu harunum, vóru eldri enn 16 mánar.

Kanningar í Svøríki vísa, at í miðal eru tað bara 20 % av teimum nýløgdu haruungunum, sum eru á lívi várið eftir. Fellið er eisini tengd at, hvussu nógv rovdjór eru í økinum. Svensku kanningarnar vístu, at tá fá rovdjór vóru í økinum, vóru tað 42 % av teimum vaksnu harunum, sum yvirlivdu vetrarnar, men tá talið av rovdjórum øktist, vaks eisini deyðiligheitin hjá harunum. Í miðal vóru tað einans 19 % av teimum vaksnu harunum, sum yvirlivdu vetrarnar, tá nógv rovdjór vóru í økinum.

At fellið er stórt fyrsta part av lívinum ger, at miðalaldurin í stovninum ikki verður serliga høgur. Ein kanning av einum harustovni í Japan vísti, at har var miðalaldurin á harunum einans 0,83 ár. Soleiðis man tað uttan iva vera við harum nógva aðrastaðni, eisini harunum í Føroyum.

Men hvussu leingi livir so ein føroysk hara? Hendan spurningin kunna vit ikki svara við vissu, tí ongar aldurskanningar eru gjørdar av føroysku haruni. Men hóast aldurskanningar ikki eru gjørdar, so kunnu vit, vit at brúka vit og skil, gera okkum eina leysliga meting av av hesum.

Hetta kunna vit gera við støði í, hvussu nógvar ungar ein løða (hon-hara) leggur um árið, tí sæð yvir fleiri ár, so er harustovnurin støðugur. Hetta merkir, at um bara ein av teimum løgdu hon-haruungunum yvirlivir, og sjálv fær ungar, so kann hendan yvirtaka plássið hjá mammuni, og stovnsstøddin fer óbroytt til næsta ættarlið. Um tveir av teimum løgdu hon-ungunum yvirliva, so tvífaldast stovnurin og um tað í miðal er minni enn ein hon-ungi, sum yvirlivir, so minkar stovnurin.

Hetta er jú ein rættuliga einfaldur máti, men hann gevur okkum eina góða ábending um livitíðina, og kann eisini brúkast til onnur dýr, fyri at staðfesta hvussu leingi tey liva í miðal.

Lat okkum nýta hendan útrokningarháttin til føroysku haruna. Haran leggur tríggja ferðir um árið, tveir til tríggjar ungar í hvørjari løgu. Siga vit, at hon fær 7 ungar um árið, so fær hon í miðal 3½ hon-ungar. Býta vit 12 mánar við 3½ , so koma vit fram til, at miðallivitíðin hjá einari haru einans er 3 til 4 mánar.

Fyri nøkrum árum síðani arbeiddi eg sjálvur við føroyskum gráspurvum, og kannaði millum millum annað, hvussu leingi teir liva. Eg skal tí til stuttleikar nýta henda útrokningarháttin at meta um, hvussu gamal ein føroyskur gráspurvur verður. Gráspurvin, eins og haran, fær ungar tríggjar ferðir um árið; 2 – 5 ungar í hvørjari urpt. Í miðal fær hvør bøga 6,3 ungar um árið. Siga vit, at helvtin av

ungunum eru bøgur, so býta vit 3,15 upp í 12 mánar, so fáa vit, at føroyskir gráspurvar í miðal einans liva í 3,8 mánar. Hetta er ikki serliga leingi, men samsvarar væl við úrslitini, sum vit komu fram til við merkiroyndum, har Jens-Kjeld Jensen setti ringar við tølum á um beinini á gráspurvaungum, stutt áðrenn teir vórðu floygdir. Tá hetta er gjørt, ber til at fylgja hvørjum einstøkum gráspurvi gjøgnum lívið, líka til hann doyr. Tá kann ringurin avlesast, og til ber at staðfesta, hvussu leingi gráspurvin livdi. Okkara kanningar vístu, at longu tá 4 mánaðir vóru frálidnir, vóru helvtin av teimum nýfloygdu gráspurvungunum deyðir, og at 25% av teimum vóru longu deyðir, áðrenn ein mánaður var liðin. Tá 16 mánaðir vóru frálidnir, vóru 75% av gráspurvunum deyðir. Sum fyrr nevnt, so er fellið hjá smáum dýrum størst fyrsta part av lívinum, men minkar so munandi, tá dýrini eru fullvaksin. Hetta er eisini galdandi fyri gráspurvar. Hóast helvtin av ungunum einans untust at liva í fýra mánaðir, so gekk betur há teimum vaksnu, tí í miðal livir føroyski gráspurvurin í 16 mánaðir. Tann elsti gráspurvurin, sum vit vita um í Føroyum, gjørdist næstan 10 ára gamal.

Hetta dømi vísir okkum, at vit skulu vera eitt sindur varin við at nýta miðallivitíð og hægsta aldur, tá vit skulu meta um livitíðina hjá dýrum. Hetta er eisini galdandi fyri fyri føroysku harurnar, har helst minni enn helvtin av teimum nýløgdu haruungunum gerast eitt ára gamlir, og uppaftur færri kunna hátíðarhalda sín tvey ára føðingardag.

Eg byrjaði við at siga at fyri neyvt at kanna livitíðina hjá haru, mugu vit merkja haruungar, tá hesir verða lagdir, og so fylgja teimum til teir doyggja. Eg havi hoyrt um, at menn í Føroyum til stuttleika hava markað ella merkt harur, men eg kenn einki til úrslitini frá hesum merkingunum. So er tað onkur, sum veit um tílíkar merkiroyndir, og um hvussu gamlar harurnar gjørdust, frætti eg fegin. Til ber at skriva til mín, ella at ringja til Fróðskaparsetrið.

Tá menn koma aftur av haruveiðu, og dagsins fongur liggur á gólvinum, meta teir ofta um veiðuna. Tá ber eisini til at staðfesta, umleið hvussu gamlar tær skotnu harurnar eru. Hetta kann gerast við at føla á fótliðinum á frambeinunum á haruni (*sí myndin niðanfyri)*

Hetta var eitt sindur um hvussu leingi ein hara livir. Næsta mánamorgun skulu vit viðgera evnið “Um ov nógv verður skotið av haru í Føroyum”




*Tað ber til at staðfesta aldurin á eini haru við at føla á fótliðinum á frambeinunum á haruni. Tá haran er heilt ung, er ein knykil (ella runnur) framman á albogalegginum ímóti fótliðinum (reyðu pílarnir). Knyklin minkar, sum haran eldist og gert alt spískari sum frálíður, og roknast kann við at hann er heilt burtur, tá haran er umleið átta mánaðir gomul. Tá er albogaleggurin heilt slættur at nema við. Út frá hesum ber til at staðfesta, um haran er:*

- ***Eldri enn 8 mánar**: Tær gomlu harurnar frá árinum fyri, og tær frá fyrstu løguni, sum er í **februar - mars**, hava ongan knykil.*
- ***5 til 8 mánar:** Tær frá aðru løguni, sum er í **mai - juni**, hava ein spískan knykil.*
- ***Yngri enn 5 mánar:** Tær yngstu harurnar, tær frá triðju løguni, sum er í **august – september**, hava ein stóran rundan knykil.*

## 6. Verður ov nógv skotið?

Seinasta mánamorgun hoyrdu vit eitt sindur um, hvussu leingi ein hara livir. Í morgun skulu vit viðgera evnið, um ov nógv verður skotið av haru í Føroyum.

Síðani eg í 2012 fór undir at skráseta, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum, eru tað summi, sum siga, at kapping nú er komin í haruskjótingina, og at hetta fer at ganga út yvir tann Føroyska harustovnin. Eg haldi tó ikki, at hetta enn er vorðið ein trupulleiki. Høvuðsmunurin millum “fyrr” og “nú” er tann, at fyrr vistu vit ikki, hvussu nógvar harur vórðu skotnar í Føroyum, men tað vita vit nú.

Vit kunna í dag skjóta harur í Føroyum einar 50 dagar um árið, sunnu- og halgidagar frároknaðar; frá 2. november til 31. desember, men nógvar av teimum harunum, sum ikki verða skotnar í harutíðini doyggja tó helst kortini, antin av svongd, sjúku ella av kulda, tað sum eftir er av vetrinum. Hetta veldst tó altíð um, hvussu vetrarveðrið skikkar sær. Er veturin mildur, yvirliva nógvar harur, men er veturin hinvegin harður, við nógvum og liggjandi kava, so doyggja nógvar harur, antin av svongd ella av kulda,

Ein eldri harumaður í eini lítlari føroyskari bygd segði mær, at eitt árið hevði hann skotið tilsamans 50 harur í einum haga har í bygdini. Hetta var miðskeiðis í 1980’unum. Hann varð átalaður fyri hetta, tí tey hildu, at hann hevði skotið í so nógvar, og at hann tí kanska hevði oytt harustovnin í haganum. Maðurin gjørdist illa við, og fór hann tí eftir hesa ábreiðsluna at telja, hvussu nógvar deyðar harur hann fann í bønum og rundan um húsini. Tað vísti seg, at í tíðarskeiðinum frá fyrst í januar til hálvan mars mánað tað árið, taldi hann tilsamans 30 harur, sum lógu deyðar og sløddust rundan um húsin. Talið av “sjálvdeyðum” harum var sostatt 2/3 av tí, sum hesin maðurin hevði skotið í haganum tað árið. Tað er tí ikki bara skjótingin, sum minkar um harustovnin. Náttúrukreftirnar gera sanniliga eisini um seg, tí hendan søgan er ikki nakað eindømi. Ringar kavavetrar eru tað sostatt nógvar av teimum harunum, sum yvirliva haruskjótingina í november og desember mánað, men sum ikki yvirliva veturin.

Hetta vil sjálvsagt gang út yvir harustovnin, men eru umstøðurnar til vildar, so er hara før fyri at nøra seg skjótt aftur, tí hon leggur heilar tríggjar ferðir um árið; tveir til tríggir ungar í hvørjari løgu.

Lat okkum tí gera eitt lítið roknistykkið, sum vísir, hvussu skjótt haran kann nørast: Siga vit, at tá veiðitíðin byrjar (2. november) eru 20.000 harur í Føroyum. Um helvtin verður skotin, so eru 10.000 harur eftir fyrsta januar: 5.000 frensar og 5.000 løður (tað eru hon-harurnar). Um hvør av hesum løðunum fær 7 ungar gjøgnum árið, so verður hetta 35.000 ungar tilsaman. Tær 10.000 harurnar, sum vóru eftir 1. januar, eru nú vorðnar til 45.000 harur.

Í roknistykkinum ganga vit út frá, at allar tær vaksnu harurnar, sum vóru til tann 1. januar, yvirliva, og at allir teir løgdu ungarnir eisini yvirliva. Hetta er sjálvsagt ikki so, tí fleiri av teimum gomlu harunum doyggja gjøgnum veturin, sum eg longu havi greitt frá, og fáa tí heldur ongar ungar. Allir ungarnir, sum verða lagdir, yvirliva heldur ikki. Fleiri verða tiknir av fugli og kanska eisini av rottu og kettu. Alt hetta ger, at vit tí ikki hava 45.000 harur, tá veiðitíðin byrjar aftur 2. november, men kanska bara einar 20.000. Allar hinar umleið 25.000 harurnar, bæði vaksnar og ungar, doyggja av náttúruávum, í tíðarskeiðinum frá januar til november.

Nú er tað helst onkur sum spyr, hvussu eg kann vita, at einans 20.000 harur eru eftir, tá harutíðin byrjar? Hetta veit eg sjálvsagt ikki við vissu, og tað er eisini munur á, frá einum ári til annað, men sæð yvir fleiri ár, er tann samlaði føroyski harustovnurin støðugur, og eftir míni varisligu meting, einar 20.000 harur tilsamans.

**STOVNSRØKT**
Men hvussu er so røktin av føroyska harustovninum. Sum við so nógvum øðrum, sum hevur við føroysku náttúruna at gera, so passar haran seg sjálva, og eingin myndugleiki fylgir við, hvussu nógv verður skotið, ella hvussu føroyski harustovnurin hevur tað.

Fyri at hava eina skilagóða stovnsrøkt, eru tvær aðalreglur eru galdandi: Tann fyrra er, at vit vita, hvussu nógv verður tikið burtur úr stovninum. Hin er, at vit vita, hvussu stórur stovnurin er. Við støði í teimum kanningunum, sum eg havi gjørt hesi seinastu 5 árini, vita vit nú, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum á hvørjum ári, og vit hava eisini eina hóming av, hvussu stórur tann føroyski harustovnurin er. Verður henda kanningin eisini gjørd í framtíðini, ber til at fylgja við gongdini. Um royndin verður ov stór, fer hetta eisini at síggjast aftur í harustovninum og í talinum av harum, sum verða skotnar, tí talið fer tá at minka. Um samlaða talið av skotnum harum minkar fleiri ár á rað, er hetta tekin um, at veiðan hevur verið ov stór, og so er neyðugt at avmarka veiðuna.

Hetta kann gerast upp á fleiri mátar, t.d.: Stytta um veiðitíðina. Seta hámark á, hvussu nógvar byrsur eru loyvdar í hvørjum haga hvønn túrin. Eisini ber til at seta hámark fyri, hvussu nógvir túrar kunnu verða gjørdir í einum haga á hvørjum ári.

Tað hevur fyrr verið vanligt í Føroyum, at mark var sett fyri, hvussu nógvar byrsur vóru loyvdar í einum haga. Hetta varð upplýst, tá hagarnir vórðu seldir, men eg havi tó varhugan av, at hendan avmarkingin ikki verður so nógv nýtt longur.

Um eg skal taka saman um tað, sum eg havi nevnt í morgun, so haldi eg ikki, at tað í løtuni verður skotið ov nógv av haru í Føroyum. Men um tað í framtíðini fer at vísa seg, at veiðan verður ov stór, so eru fleiri møguleikar fyri at seta tiltøk í verk, sum kunna minka um veiðuna.

Hetta var næstseinasta innslagið um haruskjóting í Føroyum, sum hevur verð teir seinastu seks mánamorgnarnar. Næsta mánamorgun verður seinast innslag. Tá skulu vit hoyra um, at tað bara eru menn, sum skjóta harur í Føroyum.



## 7. Haruskjóting – Ein mannfólkaítrótt burturav

Vit hava nú í seks mánamorgnar viðgjørt ymisk evni, sum hava við haru og haruskjóting at gera. Tað sum eyðkennir haruskjótingina í Føroyum er, at tað so at siga bara eru menn sum skjóta. Eg havi fleiri ferðir sóknast eftir konufólkum, sum hava skotið harur í Føroyum, men fyribils eri eg bara vitandi um nakrar fáar damur, sum hava skotið harur. Ein er í Hvalvík, ein í Kvívík og so eina í Nólsoy. Onkrar aðrar hava verið við, tá menn hava skotið, men tá hava tær verið við antin sum berarar ella bara fylgst við skjúttunum.

Men nú ein dagin fann eg aftur ein føroyska damu, sum skeyt harur. Hetta er ein dama, sum er kend frá útvarpinum. Sum so ofta nú á døgum, so fann eg hana á einari mynd á Fjesbókini, har hon situr so spelkin á einum steini við einar tveyskotsbyrsu í hondini; í turkislittari húgvu og í fjallastivlum. Og mín sann, um hon ikki hevur tvær harur liggjandi við síðuna av sær, sum hon allarhelst eisini sjálv hevur skotið. Jú, sanniliga finnast tað føroyskar harudamur, eisini nú á døgum, hóast tað er langt í millum tær. Men menninar kunnu tær als ikki samanberast við, tí á hvørjum ári eru teir einir 1.000- 1.200, sum skjóta harur í Føroyum.

Eg havi sum sagt ofta sóknast eftir konufólki, sum hava skotið harur í Føroyum. Fyri einum tveimum árum síðani ringdi ein eldri kona til mín og fortaldi, at mamma hennara sum ung plagdi at skjóta harur saman við manninum. "*Tað eina árið fekk hon tvær harur í einum skoti*" fortaldi hendan konan mær, "*men hetta hevur verið áðrenn 1916, tí hetta árið fekk mamma hennara sítt fyrsta barn, og tá gavst hon at skjóta harur*" segði hendan konan mær.

Men hví eru tað so at siga bar menn, sum skjóta harur í Føroyum?

Hetta hevur helst fyrst og fremst við aldargamla siðvenju at gera: Tað er maðurin í húsinum , sum syrgir fyri, at maturin kemur í húsið. Vit kenna hetta frá grindadrápi, har tað næstan bara eru menn, sum eru við í drápinum. Vit kenna tað frá fjallgongu, har tað næstan bara eru menn, sum ganga á fjall, og vit kenna tað frá fiskiskapi, har tað næstan bara eru menn, sum fara á fjørðin at fáa sær eitt kók. Tað eru eisini bara menn, sum taka havhestaungar, í øllum førum sum eg veit um.

Tá tað kemur til at hagreiða matin, sum er fingin í húsið, so eru tað eisini vanliga menninir, sum taka sær av hesum. Men tá tað kemur til at matgera hendan serføroyska matin, tá taka konufólkini yvir. Hetta er í øllum førum galdandi fyri grind og alt tað, sum hevur við seyð at gera. Men tá tað kemur til harur og eisini havhestaungar, haldi eg, so eru tað menninir sum gera matin og borðreiða við hesum, sum teir sjálvir hava fingið fatur á.

Hví konufólk als einki hava við harur og havestaungar at gera, hevur kanska eisini okkurt at gera við, at júst hesum báðum djórasløgunum skulu barnakonur halda seg burtur frá. Orsøkin er tann, at bæði kunnu vera fongd við sjúku: harur við sjúkuni "Toxoplasmosu", og havhestarnir við havhestasjúkuni. Hetta eru tvær sjúkur, sum báðar kunna skaða tað ófødda barnið. Toxoplasmosa er sama sjúkan, sum kettur eisini kunnu hava, og tí verður eisini mæt til, at barnakonur halda seg burtur frá kettubakkum, meðan tær eru uppá vegin. Havhestasjúkuna munnu tey flestu hava hoyrt um. Hon gjørdi rættuliga um seg í Føroyum í 1930-árunum, har nógv fólk doyðu, serliga barnakonur. Fólk blivu smittað av einari bakteriu, sum havhestaungar høvdu í sær, og tí var mælt frá, at konufólk høvdu nakað við havhestaungar at gera. Kanska er hetta grundin til, at konufólk í Føroyum kunn matgera næstan allan mat, men ikki haru og havhestaungar.

At tað so at siga bara eru menn, sum skjóta harur í Føroyum, er tí kanska ein loyvd frá urinstinktinum, sum framvegis er innbygt í okkum nútíðar monnum, har tað er maðurin, sum skaffar matin, men tá hann er komin í frystiboksina, so er tað konan, sum tekur yvir. Ella, sum tað stendur í onkrum av hesum fínu donsku lærubókunum: Maðurin er "naturen", meðan konan er "kulturen".



*Í Føroyum eru tað mest menn, sum skjóta harur, men tað hendir seg eisini, at konufólk fara í haga við byrsu.*

